# Avgreiðslufólk

Til Farodane City sóknast vit eftir avgreiðslufólki innan skrivstovulutir at byrja skjótast gjørligt.

**Starvsøki:**
Sum partur av skrivstovumarknaðinum Farodane City á Smyrilsvegi 7 fevnir starvsøki títt fyrst og fremst um sølu av skrivstovulutum - bæði í handlinum og við telefonavgreiðslu. Saman við handilsleiðaranum kemur tú m.a. at skipa fyri bíleggingum, vøruúrvali, søluátøkum v.m.

**Fyritreytir:**
Vit vænta at tú hevur royndir innan sølu ella handil, við fyrimuni innan skrivstovulutir. Viðkomandi útbúgving er ein fyrimunur, tó at størstur dentur verður lagdur á at tú dugir væl at tosa við fólk, ert skyldurøkin og fyrikomandi. Herumframt skalt tú vera teldukøn/ur á vanligum brúkarastøði.

**Vit bjóða tær:**
Tú kemur í eitt avbjóðandi starv, har tú fært eina vøru- og søluvenjing á høgum støði. Saman við 45 starvsfeløgum verður tú við til at mynda eina gamla, men nútímans fyrituku í støðugum vøkstri. Lønin verður ásett í samráð við leiðsluna.

Skrivlig umsókn við viðmælum/prógvum skal verða okkum í hendi innan týsdagin 4. februar 2003.

**FARODANE City**
SKRIVSTOVUMARKNAÐUR

*Farodane er 52 ára gamalt handils- og tænastuvirkið, sum í dag er millum landsins fremstu heildarveitarum til skrivstovuna.*
*Virksemið fevnir um sølu og tænastu av framkomnum KT-loysnum, kopi-, fax- og AV-tólum, skrivstovuinnbúgvi og øðrum skrivstovubúnaði. Farodane hevur eisini skeiðtænastuna Kvasir og skrivstovumarknaðin Farodane City.*

Umsókn skal sendast til:

FARODANE P/F
Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311414
farodane@farodane.fo
www.farodane.fo

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Kvøldskeið í AUTOCAD

**10. - 20. februar 2003**
**(trý kvøld um vikuna) kl. 18.00 - 21.15**

**Undirvíst verður í:** Auto-Cad 2000 - gundskeið
Skeiðið er fyri fólk, sum lítlar ella ongar royndir hava at arbeiða við Auto-Cad.

**Tíð:** 10., 11., 13. og 17., 18., 20. jan. 2003
**Skeiðleiðari:** Suni Dalsgaard, arkitektur
**Kostnaður:** kr. 3.500,00 íroknað frálæru, tilfar og mat
**Stað:** Tekniski Skúli, El-deildin, á 2. hædd, Smiðjugerði
**Tilmelding:** **Innan 4. februar 2003**

**Skeiðsdepilin við Marknagil * SDM**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374,
t-postur fh-sth@post.olivant.fo

# Tiltøk í feb. 2003

**Íslendska fotoframsýningin „Artic Images" er í húsinum til og við sunnudagin 23. FEBRUAR 2003.**

**Leygardagur 01.**
**Ung í Føroyum** 2003 ungdómsstevna er í húsinum

**Leygardagur 01.** **kl. 21.00**
**Prix Føroyar** 2003 annað umfar í **Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

**Sunnudagur 02.** **kl. 17.00**
**Ung í Føroyum** 2003. Almenn sýning. Á skránni verður tónleikur, dansur, sangur, upplestur, video og myndlist. Myndalistaframsýning er í húsinum til og við 9. februar.

**Mánadagur 03.** **kl. 19.30**
**Klipp** Filmsfelag Norðurlandahúsins sýnir: „The Man Without a Past". Aki Kaurismäki, Finland 2002, 97. min (Besti norðurlendski filmur 2002)

**Leygardagur 08.** **kl. 16.00**
**Havnar Hornorkestur 100 ár** - heiðurskonsert í Høllini

**Sunnudagur 09.** **kl. 14.00**
**Orðið í Norði:** Sjey rithøvundar, sum eru í uppskoti at fáa Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2003 lesa og greiða frá: Morten Søndergaard (DK), Pirjo Hassinen (FIN), Hanus Kamban (FR), Jóhann Hjálmarsson (ÍS), Jørgen Norheim (N) og Liv Køltzow (N). Tiltakið verður seint beinleiðis í Útvarpi Føroya.

**Sunnudagur 09.** **kl. 15.00**
**Orfeus** Trý úr **Aldubáruni** spæla í **Eiriksgarði í Dali**

**Mikudagur 12.** **kl. 19.30**
**Orfeus** Trý úr **Aldubáruni** spæla í Klingruni í Norðurlandahúsinum

**Fríggjadagur 14.**
**Talv:** Norðurlendsk barnatalvkapping

**Fríggjadagur 14.** **kl. 20.00**
**Barnadansur** við dansifelagnum í **Havn**. Hetta er seinasta dansikvøldið fyri børnum hendan veturin

**Leygardagur 15.**
**Talv:** Norðurlendsk barnatalvkapping

**Leygardagur 15.** **kl. 21.00**
**Prix Føroyar** 2003 triðja umfar í **Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

**Sunnudagur 16.**
**Talv:** Norðurlendsk barnatalvkapping

**Sunnudagur 22.** **kl. 16.00**
**„Kvedar"** Norðurlendsk kvæði, sangir og tónleikur. Luttakarar: Halvor Håkanes (N), Agnes Duen Garnås (N), Eli Storbekken (N), Cathrine Smith (N), Aiva Insulaner (S), Marianne Maans (FIN) og Nólsoyar Dansifelag (FO)

**Leygardagur 22.** **kl. 21.00**
**Prix Føroyar** 2003 fjórða umfar í **Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

**Týsdagur 25.**
**Starvsfólkadagur. Norðurlandahúsið er stongt.**

**Mikudagur 26.** **kl. 19.30**
**Helga Hjörvar** heldur fyrilestur. Fyriskipari er **Norrøna Felagið**

***Broytingar í skránni kunnu koma fyri.***
***Høvi er at keypa te, kaffi, sodavatn, øl, breyð, køkur o.a. í kaffistovuni.***
***Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00 -18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00.***

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Grundskeið í sveising

**10. - 14. februar 2003 kl. 08.10-15.30**

**Skeiðið umfatar:** Ástøðiliga og handaliga undirvísing innan gass-, elektrodu-, MIG/MAG og TIG-sveising.

**Skeiðleiðari:** Bjarni Olsen, Tekniski Skúlin í Tórshavn
**Kostnaður:** 4.800,00 kr. íroknað tilfar og mat
**Tilmelding:** **áðrenn 4. februar 2003**

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.**

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul hadani.**

Umsóknarbløð til Yrkisdepilin og Vitan fáast á skúlanum.

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374,
t-postur fh-sth@post.olivant.fo

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Internet og Outlook

**7., 14. og 21. februar 2003**
**kl. 08.30-12.15**

**Innihald**
- hvat er World Wide Web og internet?
- hvussu verður leitað á www?
- adressur á netinum, leitiamboð t.d. Altavista.com og Yahoo.com
- teldupostur (senda, goyma,avrita og framsenda)
- at senda eina fílu

**Skeiðleiðari:** Martha Dalsgaard
**Kostnaður:** Kr. 1.900,00 íroknað frálæru, tilfar og mat
**Tilmelding:** **Í seinasta lagi 4. feb. 2003**

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374,
t-postur fh-sth@post.olivant.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



## Heimarøktin í Norðoyggjum

# Dagligur leiðari

**Heimarøktin í Norðoyggjum søkir eftir einum dagligum leiðara til nýggja Sambýlið undir Kráarbrekku, at byrja 1. mars 2003, ella eftir nærri avtalu.**

Sambýlið undir Kráarbrekku verður væntandi tikið í nýtslu í mars/apríl 2003. Pláss verður fyri 16 búfólkum, sum hava tørv fyri umsorgan, røkt og støðugari hjáveru.

Sum leiðari hevur tú ábyrgdina av, at tað einkulta búfólki fær eitt trygt og gott lív. Harumframt skal leiðarin, saman við starvsfólkunum, skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka búfólkinum.

Leiðarin skal standa fyri tí fakligu og fyrisitingarligu ábyrgdini av heiminum.

Leiðarin á Sambýlinum vísir til økisleiðaran í Heimarøktini í Norðoyggjum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir og at skaffa sær vitan innan eldraøki. Hevur evni og vilja at samstarva á øllum økjum, er sjónligur í sínum leiðarastarvi og dugir at fáa síni sjónarmið fram.
Søkt verður eftir fólki við breiðari heilsufakligari útbúgving og helst við leiðsluroyndum.

Starvið á Sambýlinum undir Kráarbrekku er eitt fulltíðarstarv og verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Starvslýsing fæst við at venda sær til Elsbu Lützen, økisleiðara, á telefon 222783, 457610 ella 457243.

Skrivlig umsókn, saman við prógvi, viðmælum v.m. verður at senda til

**Heimarøktina & Serforsorgina**
Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 13.02.03**
Umsóknin skal merkjast: **»Leiðari«**

# Frá Føroya Psoriasisfelag

Vit vilja hervið boða frá at komandi viðgerðartúrur til Bláa Lónið verður 13. apríl til 9. mai 2003. Tey, ið hava tørv á viðgerð verða biðin um at fara til egnan kommunulækna. Læknin fyllir umsóknarblað út og sendir tað til húðlæknan.

Umsóknin skal latast inn í seinasta lagi 1. februar 2003.

Um ivaspurningar eru hesum viðvíkjandi eru tit vælkomin at ringja á tlf. 424 179.

ÚTSØLA!
ÚTSØLAN HELDUR FRAM Í ELDING!!!

ÚTSØLA!
AVMARKAD NØGD • SKUNDA TÆR!!
1399,00
Spar 491,-
DENVER DVD SPÆLARI
132 • Multi region • 2 channel output • Dolby Digital Out • DTS Digital Out • S-VIDEO OUT • Fjarstýring • Vanl. prisur: 1890,-

10990,00
Spar 3400,-
PHILIPS
32" WIDE SCREEN SJÓNVARP
32PW9505 • 32" Widescreen với stereo • SMART-TXT • FM-Radio o.m.a. • Vanl. prisur: 14390,-

Spar 601,-
2499,00
ARENA 20" SJÓNVARP
• TXT varp • Fjarstýring
• Vanl. prisur: 3100,-

ÚTSØLA!
AVMARKAD NØGD • SKUNDA TÆR!!

Spar 591,-
1999,00
AIWA
STEREOANLEGG
NSX-919• 3x CD • Bandupt. • Radio • Fjarstýring
• Vanl. prisur: 2590,-

Spar 659,-
1890,00
AIWA
MICRO ANLEGG
NSX-EMD• 3x CD • Bandupt. • Radio • Fjarstýring • Timer • Vanl. prisur: 2545,-

STÓRT ÚRVAL AV FARTELEFONUM
M.a. Nokia 3310, Nokia 5210, 7210, 6510, Ericsson T66, T20, Siemens ME45, M50, Samsung SGHT-T100 og nógv annað...!

VIT RUDDA!
AVMARKAD NØGD TIL SERA NÓGV NIÐURSETTAR PRÍSIR!!!

AVMARKAD NØGD
AEG UPPVASKIMASKINA
6585IVI • Stærð: 82-88x60x57cm • 5 forrit • Orkuflokkur A • Lítbindandi 47dB • Vanl. prisur: 11200,-
6999,00
Spar 4201,-

AVMARKAD NØGD
AEG UPPVASKIMASKINA - STÁL
55750I-m VI • SUPERLAGDORKA • 11 LLC • Vatnsnemur • Reyðljósmyndarigrip • Vatnrylstur pr. uppvask, ltr.: 15 (Okonomi 50°C við forskoli) • Ein-fyrlata pr.uppvask, kWh: 1 (Okonomi 50°C við forskoli) • Orkuflokkur A • Stærð, HxBxD I mm: 759x546x565 • Vanl. prisur: 14765,-
8999,00
Spar 5766,-

AVMARKAD NØGD
AEG INTIGRERAD KØLISKÁP
SANTO SK8120Ii • Rúmd kal. brutlyndmetu, ltr.: 227/72 • Super-kulli-uskúffur • Ein-fyrlata pr. dagur.ltr. KWh: 0,422/154,83 • Orkuflokkur: A • Vanl. prisur: 3336,-
5999,00
Spar 3336,-

AVMARKAD NØGD
AEG INNBYGN. ØVNUR - STÁL
84140-1m • Multifunktionsovnur við 9 funktiónum • PYROLUXE® - pyroltisk. sjálvreinsa • Elektronisk ovnstýring • Barnatryggi • Steikitermometur • ISOFRONT Fog • Innbyggingarmál H x B x D, cm : 59 x 56 x 55 • Vanl. prisur: 16500,-
8990,00
Spar 5260,-

AVMARKAD NØGD
AEG INNBYGN. ØVNUR - AluTec
84140-1m • Multifunktionsovnur við 9 funktiónum • PYROLUXE® - pyroltisk. sjálvreinsa • Elektronisk ovnstýring • Barnatryggi • Steikitermometur • ISOFRONT Fog • Innbyggingarmál H x B x D, cm : 59 x 56 x 55 • Vanl. prisur: 16500,-
11990,00
Spar 4510,-

AVMARKAD NØGD
AEG FINGER TOUCH PLATA
60420 X-cms • Innbyggingarhella • Glanskeramisk yvirplata • Elektronisk stýring • Finger Touch • High-Light bilkakar: • D mm : 500 • Hólmál B, mm : 490 • Hólmál H, mm : 55 • Hólmál B, mm : 560 • B, mm : 570 • Ramma er rustfrium stál • Kókvakar: 1 x 18 cm, 3 x 14,5 cm, 1 x 14,5 cm og 1 x 21 cm • Vanl. prisur: 12200,-
8990,00
Spar 3210,-

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697
- EIN BETRI LOYSN

# Lærlingur/arbeiðsfólk

Søkt verður eftir lærlingi/arbeiðsfólki til Vakstrarhúsið/Blómubúðina Dáin í Sandavági.

Nærri fæst at vita við at ringja til 332364 ella 229310.

**Vakstrarhúsið/Blómubúðin Dáin**
v/Kára á Lofti • Sandavágur
Tlf. 332364 • Fartlf. 229310

# ALMENNUR FYRILESTUR

Fyribyrgingarráðið skipar fyri almennum fyrilestri:

**Mikudagin hin 29. januar 2003 kl. 19.30**
**á Hotel Føroyum**

við heitinum:

**Alkohol og tess negativu og positivu árin á heilsuna.**

Fyrilestrarhaldarin verður Professor dr. Med. PhD Morten Grønbæk frá Statens Institut for Alkoholforskning.

Aftaná verður høvi til at seta spurningar.

Sosialurin Lesið Sosialin -tað loysir seg!

Sosialurin